# Orðaspæl

**Orðaspæl**
Børnunum í søguni dámar væl at spæla sær við nøvnum. Tey stava nøvnini aftanífrá og fáa nýggj undarlig nøvn burtur úr tí.
Til dømis eitur svartaklukkan Nakkulk, sum er klukkan stavað aftanífrá. Nú skulu tit eisini skriva nøvn aftanífrá.

- Hvussu eitur tú, um tú skrivar navnið aftanífrá?
- Hvussu eita hini í tínum húsi, um tú skrivar teirra nøvn aftanífrá?
- Les nøvnini upp fyri einum makkara.
- Skiftið leiklut.

Í søguni gera børnini stuttlig rím. Nú skalt tú gera nøkur rím, har tú brúkar nøkur nøvn skrivað vanligt og aftanífrá, til dømis Sámal fer at fiska, og Lamás er ein kiska.

- Vel fimm nøvn.
- Skriva nøvnini vanligt og aftanífrá.
- Skriva fimm rím við einum navni í hvørjum vanligt og aftanífrá.
- Les rímini fyri einum makkara.
- Skiftið leiklut

